# Føroyingar ynskja Sandoyartunnil útsettan

**Alt landið**

| Løgtingið eigur at útseta undirsjóvartunnilin millum Sandoy og Streymoynna? | Prosent |
|---|---|
| Samd(ur) | 70,8 |
| Ósamd(ur) | 23,9 |
| Veit ikki | 5,3 |
| Tils. | 100,0 |

**70 prosent av føroyingum halda, at undirsjóvartunnilin millum Sandoy og Streymoy skal útsetast**

VELJARAKANNING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í veljarakanningini, sum Fynd gjørdi fyri Sosialin í september, sæst, at 70 prosent av føroyingum ynskja at undirsjóvartunnilin til Sandoynna skal verða útsettur.

Av teimum 621 spurdu vildu 70,8 prosent útseta tunnilin, meðan 23,9 prosent ikki ynsktu at útseta hann. 5 prosent av teimum spurdu høvdu ikki tikið støðu ella svaraðu ógreitt. Spurningurin, sum settur var, ljóðaði soleiðis: Løgtingið eigur at útseta undirsjóvartunnilin millum Sandoy og Streymoynna? Og vóru svarmøguleikarnir ja, nei ella veit ikki.

**Býtt upp á valdømi**

Løgtingið eigur at útseta undirsjóvartunnilin millum Sandoy og Streymoynna?

| | Suðuroy | Sandoy | Suðurstr. | Norðurstr. | Vágar | Eysturoy | Norðoyar | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Samd(ur) | 57,7 | 16,7 | 76,1 | 78,4 | 65,1 | 70,2 | 59,6 | 70,8 |
| Ósamd(ur) | 38,5 | 83,3 | 18,9 | 16,2 | 27,9 | 23,4 | 34,0 | 23,9 |
| Veit ikki | 3,8 | 0,0 | 4,2 | 0,0 | 7,0 | 6,4 | 6,4 | 4,5 |
| Ógreitt | 0,0 | 0,0 | 0,6 | 5,4 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,6 |
| Tils. | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100 |
| N = | 26 | 18 | 355 | 37 | 43 | 94 | 47 | 620 |

Spurd vórðu 620 fólk

### Sandoyingar heitastir

Ikki óvæntað eru sandoyingar heitastir fyri undirsjóvartunlinum til Streymoynna. Fyrivarni eigur sjálvsagt at verða tikið fyri, at talið av spurdum sandoyingum er sera lágt, einans 18. Men av teimum siga 16.7 prosent at tunnilin skal bíða, meðan 83.3 prosent vil hava hann nú.

Mest ivasom um verkætlanina eru fólk í Norðstreymoy, har 78.4 prosent vilja bíða, 16.2 prosent vilja hava tunnilin nú, meðan 5.4 prosent siga seg ikki hava nakra støðu til málið. Eisini er stórur meiriluti av teimum spurdu í Suðurstreymoy ímóti at tunnilin verður gjørdur nú. 76.1 prosent vilja bíða, 18.9 prosent vilja hava hann nú, og 4.8 prosent hava ikki tikið støðu enn.

# Fýra ár at gera ein Sandoyartunnil

**Á tingfundi mikudagin legði Bjarni Djurholm fram uppskot um heimild at gera fast samband millum Sandoy og Streymoy. Eftir hesum uppskotinum kann tað samanlagt taka fýra ár frá byrjanini og til koyrandi er undir Skopunarfjørð.**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandoy:** Gongst soleiðis sum Bjarni Djurholm ætlar fer undirsjóvartunnilin at ganga millum Gomlurætt á Streymoynni og yvir í Traðardal, nærhendis Meginskúlan á Sandoy.

Upprunaliga var ætlanin at verkætlanin skuldi skipast á sama hátt sum Vágatunnilin og Norðoyatunnilin. Henda ætlanin er síðani slept.

– Vit arbeiða nú við eini verkætlan, sum skal skipast á sama hátt sum tá vanligir landsvegir verða gjørdir.

– Hetta merkir, at Landsverk kemur at standa fyri at gera sáttmála og hava eftirlit við arbeiðinum. Landsverk fær eisini ábyrgdina av rakstrinum, tá tunnilin er liðugur, upplýsti vinnumálaráðharrin fyri tinginum.



*Bjarni Djurholm*

Kostnaðurin av undirsjóvartunlinum er mettur til smáar 700 mió krónur, og verður væntað at arbeiðið tekur fýra ár.

Einki verður sagt um, nær arbeiðið møguliga kann fara í gongd.

### Tvær loysnir

Frammanundan hesum uppskotinum er gjørt eitt stórt fyrireikandi arbeiði, fyri at lýsa málið so gott sum tilber, millum annað tær fíggjarligu og jarðfrøðiligu avleiðingarnar.

Játtan til forkanningar av tunlinum var fyrstu ferð á fíggjarlógini í 2005. Hetta árið var ein hálv millión játtað og í fjør 5 mió. Í ár eru játtaðar 3 mió til víðari kanningar og prosjektering.

Ein stórur spurningur í hesum máli hevur verið linjuføringin. Talan er um ta norðaru og ta sunnaru linjuføringina. Í eini kostnyttu kanning er greitt, at tunnilin ikki loysir seg fíggjarliga. Víst verður á, at tann norðara loysnin, har Hestur er við, ikki loysir seg, men at tann sunnara loysnin er tó frægari enn tann norðara.

Verkætlanin fevnir um ein 10,5 km. langan undirsjóvartunnil við tilhoyrandi vegagerð. Tunnilin verður í størstan mun tvíbreytaður, men orsakað av stóra hallinum verður hann tríbreytaður Streymoyarmegin.

Í samband við arbeiðið er kannað, hvat tunnilin kann koma at kosta, um Hestur verður partur av ætlanini. Mett verður, at henda loysnin fer at gera tunnilin einar 150 til 250 mió krónur dýrari enn loysnina, sum er í uppskoti, alt eftir um hvør loysn verður vald í hesum føri.

Tíðarætlanin fyri uppskotið er sjálvandi tengd av, hvør játtanin er. Um peningur verður játtaður til prosjektering og til útbjóðingartilfarið, kann væntast, at klárt er at fara undir arbeiðið eitt ár seinni. Mett verður, at arbeiðið fer at taka umleið fýra ár.

# Virkið Demokratia

TÍÐINDASKRIV

Demokratia hevur sent eina rúgvu av áheitanum út til fólk kring allar Føroyar um at gerast ambassadørar fyri nevndina. Játtandi svørini streyma inn og verða løgd út so hvørt. Ambassadørarnir eru at finna á heimasíðuni www.demokratia.fo. Dreymurin er, at ein hópur av fólki á henda hátt vísa nevndini sín stuðul, so Demokratia verður meira sum ein fólkarørsla.

Í farnu viku er politiska skipanin eisini farin at reagera uppá arbeiðið hjá Demokratia. Tjóðveldi hevur lagt uppskot á ting um, at Demokratia skal halda fram eftir árslok. Eisini hevur flokkurin meldað út við javnstøðupolitikki. Landsstýrið søkir um eykajáttan til Demokratia, og sjálvt um upphæddin er lítil (50.000 kr) so fegnast nevndin um hetta. Hans P. Strøm, landsstýrismaður, rósar nevndini í bløðunum. Eisini fjølmiðlarnir hava víst Demokratia nógvan ans í seinastuni, og hetta fegnast nevndin um.

Heimasíðan verður regluliga dagførd, og fyrireikingar til kappingar við vinningum, serliga ætlaðum ungfólki, eru farnar í gongd.

### Komandi tiltøk:

Mikukvøldið tann 10. oktober kl. 19.00 verður almennur økisfundur í Eydnuni á Oyrabakka. Umboð fyri Demokratia og Rúna Sivertsen luttaka.

Mikukvøldið 24. oktober kl. 19.00 verður almennur fundur í Miðlahúsinum um CEDAW-próvtøkuna í 2008. (Fyrivarni verður tikið fyri broyting av fundinum 24. oktober).

Leygardagin 27. oktober kl. 14.00 verður økisfundur í Vágum. Nærri verður lýst seinri.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!